# Tey ungu koma í fremstu røð

**– Vit fara fyrst og fremst at gera nakað við tann stóra trupulleika, at tey ungu fáa skaða og lata lív í ferðsluni. Tað er har, at tann størsti trupulleikin er, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sum ikki fer at leggja uppskot um nullhugsjónina fyri løgtingið í hesari setuni. Hann hevur tó biðið umsitingina hjá sær kanna, um tað ber til at fáa eina endamálsorðing inn í sjálva ferðslulógina**

FERÐSLA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Vit hava ein ferðslupolitikk. Vit liggja ikki á tí latu síðuni, men vit royna veruliga at gera nakað fyri at økja um trygdina á vegunum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður. Hann fór tó ikki at leggja uppskot fyri løgtingið um nullhugsjónina í hesari tingsetuni*

Landsstýrismaðurin við ferðslumálum ætlar sær ikki at leggja uppskotið um nullhugsjónina í ferðsluni fyri løgtingið í næstum. Hann ætlar sær í staðin at koma við nøkrum ítøkiligum broytingum í ferðslulógini, sum skulu royna at forða fyri, at so nógv ungfólk fáa skaða og missa lívið í ferðsluni. Og so vil hann kanna, um tað ber til at fáa eina endamálsorðing við í ferðslulógina.

– Tað er umráðandi, at vit gera nakað, har vit hava sjónligar trupulleikar í ferðsluni og tað størsta vandamálið eru teir ungu bilførararnir, sum eru yvirumboðaðir í hagtølunum yvir skadd og deyð. Tað vilja vit royna at gera nakað við og fara at brúka okkara orku til tað næstu tíðina, sigur Bjarni Djurholm.

Hann hevur lagt eitt uppskot fyri tingið, har frádømingin av koyrikoyrtinum vegna ov nógva ferð verður herd, og í heyst skal uppskot leggjast fyri tingið um royndarkoyrikort og til tey ungu og eina stigaskipan, har koyrikortið kann koma í vanda, um bilførarar gera fleiri smærri lógarbrot.

Harafturat er ein kunngerð á veg, sum fer at seta munandi størri krøv til tey, sum skulu taka koyrikort.

### Eingin nullhugsjónin

Ráðið fyri Ferðslutrygd sigur seg hava fingið eitt lyfti frá Vinnumálaráðnum um, at eitt uppskot um ferðslupolitikk, sum er grundað á eitt álit um nullhugsjónina, skal leggjast fyri løgtingið í hesari setuni. Men soleiðis verður ikki.

– Vit hava viðgjørt hatta og halda ikki, at tað er rætt at gera nú. Vit høvdu eitt aðalorðaskifti um nullhugsjónina, og í áltinum er nógv áhugavert. Sumt kann setast í verk beinanvegin, annað skal fyrireikast betur, og aftur sumt má bíða nøkur ár, sigur Bjarni Djurholm, sum tí útilokar, at eitt lógaruppskot, sum byggir á álitið um nullhugsjónina, verður langt fyri løgtingið nú.

– Vit kundu lagt eitt uppskot til samtyktar, har landsstýrismaðurin heitir á løgtingið um at heita á landsstýrismann um at gera eina lóg, men tað sigur so lítið. Tað er sum at fara út á vegin at spæla eina fanfaru og siga, at tað er melodiurin – tónin, sum vit øll skulu royna at halda.

Bjarni Djurholm er heldur ikki til reiðar at seta eina skaðanevnd at kanna ferðsluóhapp júst nú.

Landsstýrsmaðurin vil heldur brúka orku til ein stóran ítøkiligan trupulleika – at tey ungu í stóran mun fáa skaða og lata lív í ferðsluni.

### Endamálsorðing í lógina

Landsstýrismaðurin vil ikki viðurkenna, at føroyingar ongan ferðslupolitikk hava, soleiðis sum forkvinnan í Ráðnum fyri Ferðslutrygd hevur ført fram.

– Vit hava ein ferðslu-politikk. Vit liggja ikki á tí latu síðuni, men vit royna veruliga at gera nakað fyri at økja um trygdina á vegunum. Vit hava Ráðið fyri Ferðslutrygd, sum ger eitt gott arbeiði, vit hava løgregluna, Landsverk, kommurnar, Vinnumálaráðið og Bileftirlitið, sum øll gera nakað fyri at gera vegirnar tryggari.

– Málið skal verða, at skaðarnir í ferðsluni skulu verða so fáir sum yvirhøvur gjørligt, og vit síggja eisini í hagtølunum, at tað arbeiðið, sum hevur verið gjørt í nógv ár av ymsum myndugleikum og stovnum, gevur úrslit. Hetta er ein ferðslupolitikkur. , sigur Bjarni Djurholm.

Hann hevur nú biðið umsitingina hjá sær kanna, um tað ber til at fáa eina endamálsorðing inn í sjálva ferðslulógina.

– Eg eri sum heild ímóti, at lógir hava eina endamálsorðing, men í sambandi við ferðslulógina haldi eg, at tað hevði borið til. Tí hevði tað verið eitt hugskot, at vit settu eina endamálsorðing fyri ferðslupolitikkin í sjálva ferðslulógina, og so arbeiddu við tí sum grundarlagi, sigur Bjarni Djurholm.

– Tað er ómetaliga trist, tá ið vit missa fólk í ferðsluni, men eg ivist í, um vit nakrantíð verða so dugnalig til at smíða lógir og gera skipanir, at eingin fer at fáa skaða í ferðsluni. Málið skal tó vera, at ferðslan skal vera so skaðaleys sum gjørligt, og tað skulu vit arbeiða fyri.

# Bill saknar ferðslupolitikk

**Løgtingsmaðurin Bill Justinussen fer á tingfundinum mikudagin at spyrja Bjarna Djurholm um hann metir, at tørvur er á einum yvirskipaðum ferðslupolitikki í Føroyum**

FERÐSLA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tann økta ferðslan í Føroyum setir størri krøv til trygdina á vegunum, og tí er treytaleyst neyðugt hjá myndugleikunum at hava yvirskipað mál at halda seg til í framtíðar ferðslutrygdarhøpi.

Soleiðis sigur løgtingsmaðurin Bill Justinussen í einum munnligum fyrispurningi, sum hann hevur boðað frá, at hann fer at seta landsstýrismanninum Bjarna Djurholm í løgtinginum mikudagin.

Bill Justinussen vísir á, at Ráðið fyri Ferðslutrygd eftirlýsir einum almennum ferðslupolitikki, og at landsstýrismaðurin í november mánaði í fjør lovaði at leggja eitt uppskot fyri tingið, sum tók støði í álitinum um nullhugsjónina.

### Ikki bara meira ferðslu

Løgtingsmaðurin hava at vita, um landsstýrismaðurin metir, at tørvur er á einum yvirskipaðum ferðslupolitikki í Føroyum, og hvørjar aðaltættir í uppskotinum verða lagdir fyri løgtingið.

– Tað er óheppið, at vit føroyingar ikki hava ein slíkan yvirskipaðan ferðslupolitikk. Tað átti at verið ein sjálvsøgn, at vit ikki bara útbyggja undirstøðukervið og fylla vegirnar við bilum, men at vit samstundis gera alt, sum er møguligt fyri at betra um trygdina og ferðsluatburðin sum heild, so málið um null deyðsvanlukkur í ferðsluni støðugt stendur ovast á breddanum, sigur Bill Justinussen, løgtingsmaður.

## Uppsøgner á veg

Norðurlendska Ráðharraráðið hevur givið rektanum á Nordisk Journalistcenter, Birgir Kruse, eitt ætlanarskriv, har hann fær at vita, at Ráðharraráðið ætlar sær at fylgja tilmælinum frá stýrinum fyri Journlistsentrið um at siga hann úr starvinum sum rektari.

Útvarp Føroya veit at siga, at Ráðharraráðið vísir á fleiri viðurskifti, sum liggja til grund fyri, at hann skal sigast úr starvinum.

Birgir Kruse nú hevur tvær vikur til at svara ætlanarskrivnum, og hann hevur seks mánaðar uppsagnartíð.

Birgir Kruse fór í starvið sum rektari fyri Nordisk Journaliscenter í Århus í 1. februar í fjør, men í oktober mánaði var hann biðin um fyribils ikki at koma aftur til arbeiðis, tí Ríkisrevisiónin hevði funnist at umsitingini hjá honum av Journalistsentrinum.

Hetta fekk stýrið fyri Nordisk Journaliscenter at taka málið upp, og hetta hevur nú ført við sær, at Ráðharraráðið ætlar at siga rektaran úr starvinum.

**ek**

## Nýtt uppskot um dankortið

Bæði danski Javnaðarflokkurin og Danski Fólkaflokkurin siga seg vera sinnaðar at umhugsa møguleikan, at peningastovnarnir missa umsitingina av tí umstríddá dankortinum, og at Nationalbankin í staðin skal hava gjaldskortið um hendi.

Hetta er nýggjari leikurin í einum drúgvum talvi um, hvør skal gjalda ómaksgjaldið fyri nýtsluna av gjaldskortum. Bankarnir vilja geva handlunum rokningina, og handlarnir vilja senda rokningina víðari til brúkararnar.

Javnaðarflokkurin og Danski Fólkaflokkurin skulu tosa við stjórnina um eina loysn á stríðnum, so at brúkararnir sleppa undan tí illa dámda ómaksgjaldinum, men eydnast tað ikki, eru flokkarnir sinnaðir at finna eina semju uttan um teir báðar stjórnarflokkarnar, og tá kann koma upp á tal, at peningastovnarnir missa umsitingina av dankortinum.

**ek**